Kommunufelagið

Dagfesting
11. september 2024

Umhvørvismálaráðið

Okkara j.nr.
24/07547-10

Málsviðgeri
JH

Tygara j.nr.
24/13426

**Ummæli av broytingum í regluverki kring jarðhitaboringar**

Fyri summarfrítíðina komu uppskot til lógar- og kunngerðarbroytingar til ummælis. Talan er um *uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um el riknar hitapumpuskipanir* og *kunngerð um broyting í kunngerð um skipanir til upphiting við hitapumpum*.

Uppskotini eru eitt úrslit av tí arbeiði, sum varð sett í gongd eftir at felagið á sumri í fjør heitti á landsmyndugleikarnar um at gera neyðugar útgreiningar og tilhoyrandi reglur á økinum. Hetta var eftir, at fleiri kommunur høvdu gjørt av at steðga á við at geva nýggj loyvi til jarðhitaboringar.

Ein bólkur við viðkomandi fakfólki frá landi og kommunum varð settur, og í august 2023 handaði bólkurin landsstýriskvinnuni síni tilmæli. Síðani hevur verið arbeitt við broytingum í lóg og kunngerð, og felagið hevur í hesi tilgongd havt høvi til at gera sínar fakligu og løgfrøðiligu viðmerkingar.

Felagið hevur viðgjørt uppskotini saman við kommunalum fakfólkum og í politisku leiðsluni í felagnum. Tað er ongin ivi um, at hesar broytingar eru týðandi framstig í mun til galdandi ásetingar á økinum. Felagið vil tí fremst av øllum kvitta fyri tað arbeiðið, sum landsins myndugleikar hava gjørt við at skipa fyrireikandi arbeiðið og orða uppskotini.

Eftir okkara tykki er tað kortini gjørligt innanfyri karmarnar av hesum uppskotum at gera nakrar betringar við støði í teimum viðmerkingum, sum felagið hevur fingið inn frá teimum fakfólkum í kommununum, ið dagliga arbeiða við hesum øki og sum hava sett seg væl inn í smálutirnar í uppskotunum.

Felagið heitir tí staðiliga á Umhvørvismálaráðið um gjølliga at gjøgnumganga skrivligu viðmerkingarnar frá Tórshavnar og Runavíkar kommunum, og gera neyðugu broytingarnar til tess at uppskotini kunnu gerast ein enn betur karmur kring hetta økið – herundir eisini kommunalu málsviðgerðini og møguleikarnar hjá kommununum at viðvirka til eina skynsama stýring av útbreiðsluni av jarðhita í Føroyum.

At enda verður heitt á landsstýrið um at skapa tryggari karmar um teir skaðar, sum kunnu kunnu standast av hesum virksemi. Felagið metir ikki at verandi orðing í § 9, stk. 1, nr. 3, er

ein nøktandi verja, tí hon forðar neyvan fyri, at installatørar og brunnborarar umvegis avtalu leggja endurgjaldsábyrgdina á endabrúkaran.

Tað hevði eftir okkara tykki verið skeivt í hesum arbeiðinum at forsøma at skipa viðurskiftini um ábyrgd fyri skaðum. Tað er so stórt virksemi á hesum øki, at tað er við nærum fullari vissu bert ein spurningur um tíð, áðrenn ein stórur skaði kemur fyri, t.d. kostnaðarmiklir skaðar á infrakervi ella vatnskaðar, sum raka stórar partar av grannaløgum.

Hesir vansar kunnu seta kommunur og serliga borgarar í eina óhepna støðu. Eitt vanligt húski kann sostatt fáa eitt ella fleiri krøv ímóti sær, sum tey ikki megna at gjalda og sum tey ikki altíð kunnu krevja aftur frá einum undirveitara. Og onnur húski kunnu hava fingið skaðar, sum ongin kann ábyrgdast fyri; sum tey ikki eru tryggjaði ímóti; og/ella sum ongin megnar at gjalda fult fyri.

Tað er samstundis ein sannroynd, at veitararnir av jarðhitaskipanum sum frá er liðið eru farnir at fráskriva sær altsamt meiri ábyrgd í avtalum teirra við privatkundar. Og viðskiftatreytirnar gerast altsamt longri í vavi. Hetta er óivað handilsliga væl grundað, men veitararnir gera sjálvandi bert tí at teir vita, at her kunnu standast nøkur endurgjaldskrøv av teirra virksemi um illa vil til. Keyparin av skipanini hevur samstundis ongan møguleika at forútsíggja ella fyribyrgja einum skaða, men kann kortini sita við rokningini, tá ið illa vil til. Og tað er torført bara at velja aðrar veitarar, um allir seta samsvarandi krøv.

Politiska skipanin eigur at taka støðu til, um hetta er ein hóskandi váði at seta borgarar í ella um nakað eigur at verða gjørt fyri at skipa hetta í fastari karmar. Í hesum sambandi kann havast í huga, at tað eru ein røð av møguleikum fyri at skapa tryggari karmar á økinum – tað kann vera garantiskipanir, trygging av ymsum slagi, objektiv ábyrgd fyri veitara/borara o.s.fr..

Tað snýr seg bert um at velja, hvørja skipan man vil hava og gera neyðugu ásetingarnar. Sum minsta mark eigur onki loyvi at verða givið uttan váttan um eina arbeiðstøkutrygging, sum dekkar allar skaðar upp til ávíst krónutal. Mest upplagt tykist tað kortini at leggja alla ábyrgd á veitaran av skipanini, og síðani má ein garantiskipan vera fyri alla vinnuna, sum tekur við, um ein veitari ikki kann ella vil gjalda. Í síðsta enda verður tað kortini – sum rætt er – kundin, ið við einari prísregulering í marknaðinum kemur at gjalda fyri tann váðan, sum veitarar og vinna taka á seg.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Dagfest 6. september 2024

**Stjórnarskrivstovan**

Okkara j.nr.
24/06719-4

Málsviðgeri
Øssur Patursson

Tygara j.nr.

Umhvørvismálaráðið

## Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um el riknar hitapumpuskipanir og uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um skipanir til upphiting við hitapumpum (*Eftirlitsheimildir og treytir til jarðhitaboringar*)

***Ummælisskriv til løgtingslógaruppskotið og kunngerðaruppskotið um eftirlitsheimildir og treytir til jarðhitaboringar.***

Víst verður til hoyringsskrivið hjá Umhvørvismálaráðnum dagfest tann 22. Juli 2024 viðvíkjandi *"Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um el riknar hitapumpuskipanir (eftirlitsheimildir, Jarðfeingi skal gera mátingar og skrásetingar av boriholum)"* **og** *"Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um skipanir til upphiting við hitapumpum (Treytir til jarðhitaboringar, krøv um skrásetingar og gjald)"*.

**Innleiðsla**
Tórshavnar kommuna heldur, at tað er gleðiligt, at eitt broytingaruppskot er komið frá Umhvørvismálaráðnum, sum hevur til endamáls at verja umhvørvis og jarðfrøðilig viðurskiftir og geva myndugleikum betri møguleikar at fremja eftirlit.

Tað er eisini jaligt, at Jarðfeingi aftur verður við í eftirlitinum og ráðgevingini, tí Jarðfeingi hevur serkunnleikan innan jarðfrøði og undirgrund.

Tórshavnar kommuna fegnast um, at kommunan fær betri heimild til at umsita boriloyvi, hava eftirlit við boringunum, broyta ella taka aftur loyvi, um ávís viðurskifti gera seg galdandi. Eisini at kommunan fær atgongd til øki og útgerð, sum hoyra til jarðhitaskipanina.

Kommunan hevur leingi havt ynski um betri eftirlitsheimildir, soleiðis at krøv til jarðhitaboringar og eftirlit við jarðhitaboringum betur kann útinnast til frama fyri umhvørvið. Verandi lóggáva hevur í

ávísum førum ikki givið ta neyðugu heimildina til at áseta neyðugu krøvini, serliga í sambandi við umhvørvis- og jarðfrøðilig viðurskifti, ið krevja serlig atlit. Tí er hetta broytingaruppskotið kærkomið.

Seinastu árini eru nógvar jarðhitaboringar framdar, har tað er vorðið staðfest, at nógv grundvatn er í Føroyum, og er hetta ein torgreidd (*kompleks*) skipan. Í veruleikanum er talan um nógvar ymiskar grundvatnsskipanir í Føroyum.

Við royndum frá nógvum nýggjum jarðhitaboringum seinastu árini kann Tórshavnar kommuna (*og aðrar kommunur við*) staðfesta tekniskar trupulleikar og avbjóðingar í samband við borivirksemið. Ov nógv borivatn kann ovfylla kommunalu kloakkskipanirnar. Afturat hesum tekur núverandi framferðarháttur til útbygging av jarðhita ikki hædd fyri hvussu grundvatnsrensli verður ávirkað.

Tórshavnar kommuna ynskir at hava møguleikan at verja og brúka grundvatnið, tí vatntørvurin er vaksandi.

Hóast omanfyristandandi undirtøku sum heild, so er yvirskipaða metingin hjá Tórshavnar kommunu, at uppskotið til lógar- og kunngerðarbroyting ikki tekur hædd fyri teimum avbjóðingunum, sum tann vaksandi tørvurin av jarðhitaboringum í Føroyum hevur við sær.

Tórshavnar kommuna hevur tískil hesar viðmerkingar til lógar- og kunngerðarbroytingina.

**Viðmerkingar til einstøku ásetingarnar í uppskotinum til lógarbroyting**

***§ 4 – Áseting um reglur***

Í §4, stk 4 verður skrivað "landsstýrisfólk" heldur enn landsstýrismaður, skotið verður tí upp at "landsstýrismaður" verður broytt til "landsstýrisfólk" allastaðni har tað kemur fyri.

***§ 5 – Senda umsóknir til ummælis hjá Umhvørvisstovuni og Jarðfeingi***

<u>Til § 5, stk. 1:</u>

Tórshavnar kommuna mælir til, at § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:

> "(...)
>
> Kommunan tekur avgerð í málinum, við samtykki frá US og Jarðfeingi, um loyvi til at gera eina jarðhitaskipan.
>
> (...)"

Hendan orðingin knýtir seg at orðingini í ferðslulógarinnar grein 47, stk. 3, sum ásetur at:

> "(...)
>
> Annars verða avgerðir, sum varandi kunnu ávirka nýtsluna av veg ella útgerð teirra, sum forboð fyri parkering ella steðgi, ávísing á parkeringarpláss, avgerð um treytaleysa skyldu at halda av, boð um steðg við krossveg, boð um einvegis ferðslu, útlegging av veg sum spæligøta og forboð fyri tilskilaðum sløgum av ferðslu, <u>*tiknar av politivaldinum við samtykki frá vegamyndugleikanum*</u>.
>
> (...)"

Sambært omanfyri standandi eru tað politivaldið og Tórshavnar kommunu í felag, sum taka avgerðina um at lýsa parkeringsforboð.

Semjast politivaldið og vegamyndugleikin, sum í ítøkiliga førinum er Tórshavnar kommuna, ikki, tekur avvarðandi landsstýrismaður avgerð í málinum, sbrt. § 47, stk. 6 í ferðslulógini.

Hendan orðingin tryggjar at allir partar verða hoyrdir, áðrenn ein endalig avgerð verður tikin.

Tað er umráðandi at Jarðfeingi verður tikið við uppá ráð, tí tað er umráðandi, at avgerðir verða grundaðar á eina heildarmeting av bæði jarðfrøðiligum og umhvørvisligum viðurskiftum. Smbr. nýggju §5, stk. 2 skulu bæði Umhvørvisstovan og Jarðfeingi viðgera umsóknir til ummælis, men tað er týdningarmikið at áseta, hvat hendir, um annaðhvørt Jarðfeingi ella Umhvørvisstovan mælir frá at borað verður á einum ávísum øki. Lóggávan má greitt áseta, hvør hevur avgerðarrættin í slíkum førum. Somuleiðis má tryggjast, at lógin fylgir við, um stovnarnir verða umskipaðir, broyta navn ella líknandi, so at serkunnleikin framhaldandi verður tryggjaður.

Fyri at tryggja at umsóknir um jarðhitaskipanir verða viðgjørdar á nøktandi hátt, mælir Tórshavnar kommuna til, at leisturin í ferðslulógini verður brúktur sum fyrimynd til viðgerð av loyvum til jarðhitaskipanir.

<u>Til § 5, stk. 2</u>:
Tórshavnar kommuna mælir til, at í sambandi við at veita upplýsingar um møguligar drekkivatnsveitingar, at hesar orðingarnar verða tiknar við:

- *So sum veitingar frá drekkivatnskeldum*
- *Í samráð við Umhvørvisstovuni ella Jarðfeingi*

***§ 6 – Loyvi til jarðhitaskipan skal ikki stríða móti týðandi atlitum***

<u>Til grein 6, stk. 1, nr. 2</u>:
Fyri at fáa loyvi til eina jarðhitaskipan stendur í grein 6, stk. 1, nr. 2, at:

> "(...)
>
> at tað ikki stríður móti týðandi atlitum til verandi ella framtíðar byggingar v.m. at geva loyvi til jarðhitaskipanina
>
> (...)"

Ásetingin um, at tað ikki skal stríða ímóti týðandi atlitum til verandi og framtíðar byggingar v.m., er sera ógreið. Hvat merkir v.m.? Eru lendisætlanir, kommunuætlanin ella náttúru- og jarðfrøðilig atlit umfata av orðingini "v.m."? Og hvat um Jarðfeingið kann staðfesta umhvørvisárin ella vanda fyri "wash-out" – er tað eisini fevnt av "v.m."?

Viðmerkjast skal, at kommunurnar hava avmarkaða heimild til at nokta umsóknum um jarðhita, um jarðfrøðiligar ella umhvørvisligar avbjóðingar gera seg galdandi.

Tað er av alstórum týdningi, at avgerðir um boring eftir jarðhita verða grundaðar á eina heildarmeting av bæði jarðfrøðiligum og umhvørvisligum viðurskiftum. Sambært nýggju §5, stk. 2 skal Jarðfeingi fáa

umsóknir til ummælis, men tað er neyðugt at áseta, hvat hendir, um Jarðfeingi ella Umhvørvisstovan mælir frá boring á einum ávísum øki. Lóggávan eigur at áseta, hvør hevur endaliga avgerðarrættin í slíkum málum.

Heimildin í § 8 til at taka loyvi aftur, tá skaðin longu er hendur, er ikki nøktandi, hóast tað er eitt jaligt ískoyti.

Fyri at sleppa undan at keðiligar støður kunna taka seg upp, mælir Tórshavnar kommuna til, at grein § 6, stk. 1, nr. 2 fær hesa orðingina:

> "(...)
>
> at tað ikki stríður móti týðandi atlitum til verandi ella framtíðar byggingar, lendisætlanir, kommunuætlan, náttúru- og/ella jarðfrøðilig atlit v.m. at geva loyvi til jarðhitaskipanina
>
> (...)"

Til grein 6, stk. 2, nr. 3:
Viðvíkjandi frástøðuni millum jarðhitaholini stendur í grein 6, stk. 2, nr. 3, at:

> "(...)
>
> Sum meginregla skal frástøðan vera í minsta lagi 20 metrar ímillum hvørja jarðhitaboring. Eru serligar umstøður, kann landsstýrismaðurin víkja frá hesi áseting.
>
> (...)"

Mælt verður til, at tað verður gjørt meira greitt, at tað er kommunan, sum avger frástøðuna, tí tað er kommunan sum stendur við trupulleikanum tá ið nakað gongur galið.

***§ 7a – Mátingar og kanningar av jarðhitaholum***
Í uppskotinum til nýggja grein 7a, *um mátingar og kanningar av jarðhitaholum*, stendur at:

> "(...)
>
> 7 til 14 dagar aftaná jarðhitaholið er borað, mátar Jarðfeingi í minsta lagi:
> 1) grundvatnsspegilin,
> 2) hitastig og leiðingarevni av vatninum fimta hvønn metur niður ígjøgnum boriholið, og
> 3) møguliga nøgd av artesiskum vatni.
>
> Stk. 2. Jarðfeingi skrásetir sínar mátingar og ítøkiligu staðsetingina av boriholinum í skipanina nevnd í § 7, stk. 1.
>
> Stk. 3. Jarðfeingi veitir ráðgeving til kommunur um jarðfrøðilig viðurskifti í sambandi við jarðhitaboringar.
>
> (...)"

Í stk. 3 verður nevnt at Jarðfeingi veitir neyðuga ráðgeving um jarðfrøðilig viðurskifti í sambandi við jarðhitaboringar, hetta er í sær sjálvum sera jaligt at ein serkønur stovnur er við, men ógreitt er hvør hevur heimildina at nokta, um mælt verður frá at bora.

### *§ 8 – Heimild hjá kommununi at taka loyvi aftur*

Í uppskotinum til broyttu orðingina av grein 8, *um heimild hjá kommuni at taka loyvi aftur*, stendur at:

> "(...)
>
> Kommunan kann broyta ella taka aftur loyvi, sum eru givin eftir § 3, stk. 1:
> 1) um týðandi fortreytir, sum loyvið er grundað á, eru broyttar,
> 2) um vandi er fyri, at arbeiðið at gera jarðhitaskipanina kann dálka møguligt grundvatn,
> 3) um vandi er fyri, at arbeiðið at gera jarðhitaskipanina kann ávirka tilrenningina til drekkivatnsøki
> 4) um eigari av jarðhitaskipan, installatørur ella brunnborari grovt ella endurtakandi brýtur ásetingar í lógini og reglur gjørdar við heimild í lógini ella treytir í loyvinum,
> 5) um jarðhitaskipanin ikki longur er í brúk, sbrt. § 13, stk. 2, ella
> 6) um kommunan verður forðað í at fremja sítt eftirlit eftir § 14 a-c.
>
> (...)"

Sambært broytingaruppskotinum er endamálið, við heimildini hjá kommununi, at steðga og fyribyrgja neiligari ávirkan á umhvørvið og jarðfrøðilig viðurskifti, og er hetta eitt jaligt ískoyti, men tað er ikki nokk at bara kunna taka loyvi aftur ella broyta tað.

Tað er alneyðugt at kommunan eisini kann nokta at geva loyvi til jarðhitaskipan har mett verður at boring fer at hava neiliga ávirkan á umhvørvið og undirgrundina, so sum drekkivatnsveitingar, atlit til lendisætlanir, kommunuætlanir, náttúru og/ella jarðfrøðilig atlit v.m.

### *§ 9 – Umhvørvisstovan kann taka góðkenningina hjá installatøri og brunnborara aftur*

Til grein 9, stk. 1:

Fyri at fáa góðkenning sum installatør av hitapumpuskipan stendur í grein 9, stk. 1, at:

> "(...)
>
> Umhvørvisstovan góðkennir eftir umsókn fysiskan ella løgfrøðiligan persón sum installatørur av hitapumpuskipanum og/ella sum brunnborara. Fyri at fáa góðkenning skal umsøkjarin:
> 1) ikki vera undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð,
> 2) hava neyðugan fakligan førleika til at virka sum installatørur av hitapumpuskipan, ávíkavist brunnborari, og
> 3) hava teknað neyðuga trygging ímóti møguligum endurgjaldskravi frá triðja-manni.
>
> (...)"

Í uppruna viðmerkingunum til grein 9 er tað sera ógreitt, hvussu mannagongdin er fyri at gerast góðkendur installatør av hitapumpuskipanum og/ella sum brunnborara.

Óvist er hvørjar tær ítøkiligu treytirnar eru fyri hesar góðkenningar. Treytirnar fyri góðkenningar skulu vera almennar, t.d. krøv um skeið og royndir. Ein almennur listi skal vera yvir góðkendar brunnborarar, við upplýsingum um fyritøku og ábyrgdarpersón.

Krøvini til góðkenning av brunnborarum eru ikki eftirmett. Verður hugt eftir krøvunum til el-installatørar eru krøvini nógv hægri og eru eisini lýst í aðrari lóg. Sama burdi verið gjørt við

góðkenning av brunnborarum. Samanberast kann við donsku kunngerðini frá 27. Juni 2016 nr. 915 um "*Bekendtgørelse om uddannelse af personer, der udfører boringer på land*".

Bæði ein fysiskur persónur ella eitt felag, kann verða ein løgfrøðiligur persónur. Orðingin, í bæði lóg og kunngerð, er tí eitt sindur fløkjaslig, og sáar iva um, hvørt ein góðkendur brunnborari er ein fysiskur persónur sum skal verða við tá borað verður, og sum samstundis syrgir fyri at alt fer rætt fram, og at allar neyðugar upplýsingar verða skjalfestar.

Á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni er ein listi við góðkendum brunnborifyritøkum, við fyritøkunavni, bústaði, tlf, og møgulig heimasíða, men annars ongar aðrar upplýsingar, t.d. er einki løggildingar- ella skrásetingarnummar.

Trygdaratlitini til brunnborarar hava ikki tikið støði í sjálvum boriarbeiðinum, men í mun til hitapumpu-installatiónir o.líkn. Í uppruna viðmerkingunum verður t.d. víst til, at í Svøríki eru brunnborarar SITAC-sertifiseraðir.

Tá biðið var um eitt yvirlit yvir góðkendar brunnborarar (fysiskar persónar) var svarið frá Umhvørvisstovuni at:

1. *Tað er bert neyðugt við løgfrøðiligum persóni (t.e. persónur ella felag) til góðkenning av brunnborara.*
2. *Øll brunnborifeløgini, sum hava loyvi frá Umhvørvisstovuni, lúka allar ásettar treytir í løgtingslóg um elriknar hitapumpuskipanir.*
3. *Lýkur persónur ella felag tær treytir, sum eru settar í lógini/kunngerðini um elriknar hitapumpuskipanir, so verða tey góðkend.*

Afturat hesum eru krøvini og vegleiðingar til hvussu boriholini skulu dimensionerast, og eisini borast ikki serliga greið. At brunnboring í síni heild liggur undir lóg um el-riknar hitapumpuskipanir er ikki hóskandi, og burdi tað tí verið ein tilgongd til at gera nýggja lóg sum umfatar boringar á landi sum t.d. jarðhitaboringar og aðrar orkuboringar, geotekniskar royndarboringar, vatnboringar o.a. Hetta tryggjar ikki bara jarðhitaboringar, men eisini allar aðrar boringar ið framdar vera. Í grannalondum okkara er boring, trygd osfr. lýst í vegleiðingum sum t.d. í svenska Normbrunn-16, norska NS-3056:2012 ella donsku Vejledning om boringer på land (2013).

Um samanborið verður við t.d. el-innleggjarar (og fyritøkur) stendur í løgtingslóg um løggilding av el-innleggingarfyritøkum, at el-innleggjarafyritøkan skal hava ein ella fleiri fakligir ábyrgdarar, sum eru góðkendir (§4, pk. 1). Ein listi við góðkendum el-innleggjarafyritøkum er at finna á heimasíðuni hjá arbeiðseftirlitinum har løggildingarnummar eisini stendur.

Vegna møguligar váðar tá borað verður, er alneyðugt at tryggja at ein ein fakligur ábyrgdarpersónur er til staðar, ið veit og dugir at handfara tær støður sum møguliga kunnu koma fyri.

<u>Til grein 9, stk. 4</u>:
Í verandi grein 9, stk. 4, *um heimildina hjá landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um fakligu førleikakrøvini*, stendur at:

"(...)

Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur í kunngerð um fakligu førleikakrøvini sbrt. stk. 1, nr. 2 og um, hvørjar aðrar uppgávur, enn tær í stk. 2-3 nevndu, skulu gerast av einum góðkendum installatøri ávíkavist góðkendum brunnborara, tá ein hitapumpuskipan verður gjørd.

(...)"

Her skal viðmerkjast, at ásetingin "*kann*" skal broytast til "*skal*", soleiðis at landsstýrismaðurin skal áseta nærri reglur í kunngerð um fakligu førleikakrøvini.

***§ 14 – Eftirlitsskyldan hjá kommununi***

Í uppskotinum til nýggju grein 14a, stk. 1, *um eftirlitsskylduna hjá kommununi*, stendur at:

"(...)

Kommunan hevur eftirlit við og tekur avgerð fyri at fremja § 3, stk. 2, § 4, stk. 1, § 6, stk. 1-2, § 7, stk. 2, § 11, § 12, stk. 1 og 2, § 13 og reglum givnar við heimild í hesi lóg.

(...)"

*Fyri tað fyrsta skal viðmerkjast*, at ynskiligt er at møguligar vegleiðingar ella mannagongdir til, hvussu kommunurnar praktiskt skulu fremja sítt eftirlit og seta tiltøk í verk vera gjørdar. Hetta kundi hjálpt at tryggja ein einsháttaðan framferðarhátt hjá serliga smærru kommununum.

Eisini er ynskiligt at databløð og líknandi vera send kommununum, soleiðis at kommunan (*og Umhvørvisstovan*) hava neyðugu upplýsingarnar um hvat verður brúkt av t.d. evnafrøðiligum evnum, sum t.d. sement, flokkuleringsevni o.s.fr. Hesi evni burdu eisini havt eina umhvørvisgóðkenning, sum er almenn.

*Fyri tað næsta skal viðmerkjast*, at um § 6, stk. 3 ikki verður nevnt í § 14a, stk. 1, so er øll ásetingin um eftirlitsskyldu hjá kommununi týdningarleys, tí § 6, stk. 3 ásetir allar treytir í sambandi við loyvi, sum hava við sjálva boringina, staðsetingina og burturbeining av boristøvi at gera.

Um einki samband verður staðfest millum hesa ásetingina í § 6, stk. 3 og eftirlitsskylduna í § 14a, stk. 1 hjá kommununi, fer ein týðandi partur av reglugerðini og eftirlitinum at mangla. Tí er tað av alstórum týdningi at tryggja, at § 6, stk. 3 verður viðurkent í § 14a, stk. 1, so at eftirlitið hjá kommununi verður fullfíggjað.

Mælt verður tískil til, at grein 6, stk. 3 verður umfatað av grein 14a, stk. 1 um eftirlitsskylduna hjá kommununi.

***§ 14c – Skyldan at lata kommununi upplýsingar***

Í uppskotinum til nýggju grein 14c, *um skylduna at lata kommununi upplýsingar*, stendur at:

"(...)

Installatørur, brunnborari og eigari av jarðhitaskipanini hava skyldu til at lata kommununi upplýsingar, skjøl og annað, sum er neyðugt fyri at kommunan kann røkja sínar uppgávur sambært lógini.

(...)"

Í viðmerkingunum til greinina stendur, at kommunan ger av hvørjar upplýsingar ið henni tørvar.

Ynskiligt er at databløð og líknandi vera send kommununum, soleiðis at kommunan (*og Umhvørvisstovan*) hava røttu trygdarbløðini tøk, um óhapp hendir.

***§ 14d – Eftirlitið hjá Umhvørvisstovuni við góðkendum installatøri og brunnborara***

Í uppskotinum til nýggju grein 14d, *eftirlitið hjá Umhvørvisstovuni við góðkendum installatøri og brunnborara*, stendur at:

"(...)

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við og tekur avgerð fyri at fremja § 6 a, § 7, stk. 2, § 9, stk. 2 og 3, § 10, stk. 1, og reglum givnar við heimild í hesi lóg.

(...)"

Tó stendur tað í broyttu orðingini av grein 9, stk. 5 og 6, *um at Umhvørvisstovan kann taka góðkenningina hjá installatøri og brunnborara aftur*, at:

"(...)

Stk. 5. Um ein góðkendur installatørur ávíkavist góðkendur brunnborari ikki longur lýkur krøvini fyri góðkenningini eftir stk. 1 ella reglum, ásettum við heimild í stk. 4, kann Umhvørvisstovan taka góðkenningina frá viðkomandi. Um krøvini fyri góðkenningini ikki longur verða lokin, hevur viðkomandi skyldu til at lata Umhvørvisstovuni góðkenningina aftur.

Stk. 6. Um installatørur ella brunnborari grovt ella endurtakandi brýtur ásetingar í lógini ella reglur gjørdar við heimild í lógini, kann Umhvørvisstovan taka góðkenningina aftur.

(...)"

Her burdi verið nágreinað, at Umhvørvisstovan hevur eftirlit við at góðkendur installatør ella brunnborari framhaldandi lýkur krøvini fyri góðkenning. Ein annar møguleiki er, at hetta kundi verið lagt undir Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, eins og galdandi fyri el-innstallatørar.

**Viðmerkingar til einstøku ásetingarnar í uppskotinum til kunngerðarbroyting**

***§ 9 - Krøv til boring av holi til lodrætta jarðhitaskipan***

Til grein 9, stk. 4:

Um burturbeining av tilfari frá boringini stendur í grein 9, stk. 4, at:

"(...)

tilfar frá boringini skal burturbeinast á ein tryggan hátt, soleiðis at hetta ikki kemur út í nærumhvørvið, t.e. áir, løkir, kloakkir ella út í lendið.

(...)"

Sambært hesi orðingini kann einki latast í kloakkina. Best hevði verið, um møguleiki var at geva serlig undantøk í boriloyvinum.

Kanningar hava víst, at størsti partur av boristøvinum, sum kemur eftir filturbingjuna, er minni enn 0,063 mm. Kornini frá støvinum eru so fín og smá, at tað nær ikki at botnfella, og tískil er tað ikki sannlíkt, at støvið fer at seta seg í kloakkleiðingarnar. Um tað ber til at gera undantøk í boriloyvinum í sambandi við § 9, er tað tá neyðugt at hava § 9 sum krav?

Best hevði verið at sett inn eitt nýtt punkt, ið greiðir frá, at borivatn kann latast í kloakkleiðingarnar, men bert eftir avtalu við kommununa.

Til grein 9, stk. 5:
Í uppskotinum til nýggja grein 9, stk. 5, *um stálfóðurrør*, stendur at:

"(...)

stálfóðurrør, sum í minsta lagi eru 6 metrar long, skulu stoypast í minsta lagi 2 metrar niðurum fasta hellu og eftir fyriskrivaðari mannagongd hjá Umhvørvisstovuni

(...)"

Viðmerkjast skal, at orðingin ikki er røtt, tí rørini eru 3 metrar long, og verða sveisað saman. Tað eigur at standa, at fóðurrør skulu stoypast í minsta 6 metrar niðurum fasta hellu, ella okkurt líknandi.

Til grein 9, stk. 7 og 8:
Í uppskotinum til nýggju ásetingarnar í grein 9, stk. 7 og 8, *um burturbeining av tilfari frá boringini*, stendur at:

"(...)

7) Markvirðið fyri mongd av boristøvi í borivatni skal í mesta lagi vera 1.000 mg/l

8) bingjan skal standa í minsta lagi 24 tímar uttan røring, áðrenn borivatnið verður latið út. Er borivatnið sjónliga skitið, hevur brunnborari skyldu til at steðga við útleiðingini og víða til vatnið er reint.

(...)"

Til hetta er at viðmerkja, at út frá royndum ger tað ongan mun um tað stendur í 24 tímar, tí tilfarið er so smátt at, tað nær ikki at botnfella.

Til grein 9, stk. 10:
Í uppskotinum til nýggju ásetingarnar í grein 9, stk. 10, *um burturbeining av tilfari frá boringini*, stendur at:

"(...)

10) reinsiskipanir, har evnafrøðilig evni ella filtur verður brúkt til botnfelling, skulu góðkennast av Umhvørvisstovuni, áðrenn tær verða brúktar

(...)"

Til hetta er at viðmerkja, at um um nakað slíkt verður góðkent má kommunan fáa boð. Eisini er umráðandi at databløð til evnafrøðiligi evnini verða latin.

**Vinarliga**
**k.v.**

Jóan Petur Hentze
*kommunustjóri*

RUNAVÍKAR KOMMUNA

06-09-2024

# Viðmerkingar til broytingaruppskot av lóg um el-riknar hitapumpuskipanir

Kommunan metir, at umsitingin kann fáa gagn av teimum broytingunum, sum eru í broytingaruppskotunum fyri lóg um el riknar hitapumpuskipanir.

Sum eitt dømi kann vísast til at Jarðfeingi, sum situr við serfrøðini um lendi, grundvatn og undirgrundina nú verða inndrigin og harvið heimilaði til at verða ein partur av mannagongdini at lata loyvi til jarðhitaskipanir. Við tíðini er tað vorði týðiligari, at har er tørvur á jarðfrøðiligari ráðgeving í samband við borihol til jarðhitaskipan, fyri at fyribyrgja at boriholini gera neilig inntriv sum t.d. lækking av grundvatnspegilin í drekkivatnsøkið.

*Í Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum, pkt. 2.14 stendur: Við ummæli og ráðgeving frá serkønum stovni um jarðfrøðilig viðurskifti, fær kommunan betri grundarlag til at taka avgerðir um boriloyvi til jarðhitahol, soleiðis at tað ikki fær neiliga ávirkan á vatnið í undirgrundini ella góðskuna á jarðhitaholum. Jarðhitahol verða borað í ovasta lagið í undirgrundini. Tað er sera ymiskt, hvussu nógv vatn rennur úr einum boriholi. Kemur ov nógv vatn úr boriholinum, kann tað hava neiliga ávirkan á undirgrundina og møguligar vatnveitingar hjá kommununi. Spurningur er eisini settur við, um góðskan á einum jarðhitaholi kann ávirkast, um fleiri jarðhitahol eru í einum nærri avmarkaðum øki. Tí verður skotið upp, at umsóknir um boriloyvi skulu sendast til ummælis hjá Jarðfeingi, og at Jarðfeingi skal veita kommununi neyðuga ráðgeving um jarðfrøðilig viðurskifti.*

Vil tað siga, at um Jarðfeingi metir, at tað er sannlíkt, at eitt nýtt jarðhitahol kann ávirkað góðskuna hjá grannaholum o.a., kann kommunan tá brúka ráðgevingina frá Jarðfeingi sum grundarlag fyri ikki at ganga umsóknini á møti? Í Runavíkar kommunu eru dømi um aktiv borihol, sum eru versnað aftaná at jarðhitahol var borað hjá grannanum. Tað vísti seg við at vatnstandurin í holinum lækkaði nógv.

Er tað støðan, so metir kommunan at tað eigur at verða gjørt týðiligt í lógaruppskotinum, at eitt ummæli frá Jarðfeingi og Umhvørvisstovuni kann brúkast sum grundarlag fyri at ein umsókn um jarðhitaskipan ikki verður gingin á møti. Tað kundi til dømis verið lagt afturat sum eitt punkt undir §6.

Harafturat kundi verið lagt afturat í §6, pkt. 2 at tað ikki stríður móti týðandi atlitum til náttúruna, umhvørvið, jarðfrøðina, drekkivatnsøkið, verandi ella framtíðar byggingar, byggisamtyktir, lendisætlanir v.m. at geva loyvi til jarðhitaskipanina.

Í Kapittul 1. Almennar viðmerkingar, pkt. 1.3 stendur: *Týðandi nøgdir av vatni renna støðugt úr uml. 10 % av jarðhitaboriholum, tá liðugt er at borað.*
Har burdi verið víst á, at tað er sera ymiskt frá stað til stað hvussu vatn rennur úr jarðhitaholum. Í Skálafirði renna týðandi nøgdir av vatni úr 9 av 12 jarðhitaholum.

Harafturat vildi Runavíkar kommuna mett, at øll artesiskt borihol, sum skulu nýtast til eina jarðhitaskipan skulu tettast og proppast, soleiðis at einki vatn artesiskt vatn kann renna upp úr holinum. Hetta er við tí í huga, at varðveita m.a. grundvatnsspegilin og vatnveiting. Tá er neyðugt at tryggja sær, at tann sum tettir ella proppar holið hevur neyðugu royndir við at gera arbeiði.

Um man hyggur eftir teimum støðunum, komandi eigari av einari lodrætta hitapumpuskipan kann koma út fyri aftaná jarðhitaholið er borað, er tað neyðugt kann tryggja seg ímóti skaðum egnari ogn og grannaognum.

Sum dømi kann nevnast, at rivur í einum jarðhitaholi kann gera so, at tað lekur inn á egna ella annans mans ogn.

Fyri at verða við til at verja vatnveitingarøkini enn meira enn tað er nevnt í broytingaruppskotinum, kundi tað verið ein stórur fyrimunur at kommunurnar fingu heimild í lógini at kunngerða øki har ið ikki skal borast. Tað hevði givið kommununum eitt amboð afturat við tí endamáli at verja vatnveitingarøkini.

## Viðmerkingar til greinir í broytingaruppskotinum um lóg um el riknar hitapumpuskipanir

Viðmerkingar til §3, pkt. 4) har tað stendur: Hvussu, hvar og nær boritilfar skal burturbeinast. Her vildi tað verið ein fyrimunur, um har bleiv nágreina at talan er um bæði meðan borað verður og aftaná at boriarbeiði er liðugt.

Viðmerkingar til §5, stk. 2: upplýsingar um, hvar viðkomandi drekkivatnsveitingar
Runavíkar kommuna hevur skrásett alla drekkivatnveitingina talgilt einum kortið, har almenningurin hevur atgongd. Tó eru allar privatar vatnveitingar ikki skrásettar.

Viðmerkingar til §8: taka loyvi aftur
Í § 8, stk. 1 fær kommunan heimild til at broyta ella taka aftur loyvi, sum eru givin eftir treytum upplýst í pkt. 1-6.
Pkt. 1-3 er treytað av boriarbeiðið ikki er framt ella ikki er liðugt. Vit vilja viðmerkja, at tað kann ganga sera stutt tíð frá eitt loyvi til jarðhitaskipan er latið til at boriarbeiðið verður gjørt.
Tó er tað ein fyrimunur, at møguleikin er í lóggávuni.

Í pkt. 4) stendur: at loyvi kann takst aftur um arbeiðið at gera jarðhitaskipanina kann ávirka tilrenningina til drekkivatnsøkið.
Hettta burdi verið brúkt, sum grundgeving fyri ikki at ganga umsóknini á møti.
Tó er tað ein fyrimunur, at møguleikin er í lóggávuni aftaná at loyvi er givið.

Viðmerkingar til §9, stk. 6: Installatørur ella brunnborari brýtur ásetingar
Í §9, stk. 6 stendur: Um installatørur ella brunnborari grovt ella endurtakandi brýtur ásetingar í lógini ella reglur gjørdar við heimild í lógini, kann Umhvørvisstovan taka góðkenningina aftur.
Runavíkar kommuna upplivir inn í millum at brunnborari velur aðra staðseting enn loyvi er givið til og uttan at tosa við kommununa um tað. Verður eitt slíkt brot upp á loyvi til jarðhitaskipan nakað sum kann fáa fylgjur fyri brunnborara? Tað skal ikki henda, at ein brunnborari broytir staðseting uttan loyvi. Har kunnu verða onnur hol planløgd ella onnur viðurskifti galdandi, sum viðkomandi ikki kennir til.

Viðmerkingar til §14, stk. 2: boð um tetting
Í § 14 a , stk. 2, gevur broytingaruppskotið til lóg kommununi møguleikan at geva ítøkilig boð um at tetta møgilig hol og aðrar rættandi atgerðir.
Hetta kann verða eitt hent amboð, tá ið t.d.:

- borihol elva til at vatn rennur til grannamatrikulin gjøgnum rivur í lendinum,
- tá stórar nøgdir av vatn rennur úr holinum, um man gert varugur við at boriholi letur upp fyri at møguleikan at grundvatni verður dálka

- ella um boriholið ávirkar tilrenningina til drekkivatnsøki hóast ráðgeving er fingin um at tað ikki vitanin tala fyri at tað ikki hent á tí staðnum. Vitanin um jarðfrøðina í Føroyum er ikki fullfíggjað, hóast vitanargrundarlagi økist í hvørjum samstundis við at boringar verða gjørdar.

Tá ið verður skrivað "møgulig hol" "§ 14 a , stk. 2 meinast tá við eitt møguligt hol í boriholinum? Uppskot er um at taka "møgulig" burtur úr setninginum.

Viðmerkingar §14, stk. 3: ábyrgd

Í §14, stk. 3 stendur: Tann, sum hevur ábyrgdina, ber útreiðslurnar av at tetta møgulig hol og at gera rættandi atgerðir, kommunan gevur boð um um.
Viðmælt verður at taka "møgulig" úr setninginum.

Ein sethúsaeeigari hevur ikki atgongd til tað útgerð, sum skal til fyri at tetta hol, uttan so at ein veitari kemur við tí. Hvussu verður tryggja, at sethúsaeigarin ikki kemur fíggjarliga verri fyri um har eru umstøðir við holinum, sum sethúsaeigarin ikki hevur ræði á, sum elva til at eyka útreiðslur?
Tað kundi verið ein fyrimunur, at koma við ymiskum støðum har ábyrgdarbýti er víst, og/ella vísa á hvør tað er sum ásetur hvør er ábyrgdari.

# Viðmerkingar hjá Runavíkar til kunngerð um skipanir til upphiting við hitapumpum

**Viðmerkingarnar eru at finna inni í javntekstinum fyri nevndi kunngerð:**

## Javntekstur til kunngerð um skipanir til upphiting við hitapumpum

| Kunngerð nr. 101 frá 15. oktober 2012 um skipanir til upphiting við hitapumpum, sum broytt við kunngerð nr. 118 frá 31. juli 2017 | Broytingaruppskot |
|---|---|
| *Umsókn um loyvi og góðkenning av jarðhitaskipan*<br><br>**§ 1.** [1)] Tá søkt verður um loyvi at gera eina jarðhitaskipan, skal umsóknin vera skrivað á oyðublað, sum fæst frá kommununi. Umsóknin skal innihalda hesar upplýsingar um jarðhitaskipanina:<br><br>1) navn og bústað á góðkendum fysiskum ella løgfrøðiligum hitapumpuinstallatøri sbrt. § 6, stk. 2,<br><br>2) slag av bygningi t.d. vinnubygningur, sethús, samkomuhús, skúli o.l,<br><br>3) bústað, postnummar og kommunu, har bygningur/ar er/u staðsettur/ir, somuleiðis navn á eigara,<br><br>4) upphitað vídd (m$^2$) á bygningi/ bygningum, orkutørvur á bygningi/bygningum (kWh/ár), effekttørvur (kW) og um upphitingarhátt, t.e. radiator, gólvhiti, heit luft, v.m.,<br><br>5) merki og modell av hitapumpu, hitapumpueffekt (kW) og slag og mongd av køliløgi í hitapumpuni og<br><br>6) slag av hitasavningarslangu (kollektorslangu), ið er merki, modell og tjúkd.<br><br>*Stk. 2.* [1)] Umsóknin, undirskrivað av góðkendum hitapumpuinnstallatøri, skal sendast kommununi.<br><br>*Stk. 3.* Kommunan veitir loyvi at gera og nýta jarðhitaskipanir. | *stk. 2.* Installatørur leggur uppskot til staðseting av boriholi í telduskipanina hjá Umhvørvisstovuni, tá umsókn um boriloyvi verður latin kommununi.<br><br>*Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.*<br>*Viðmerking:*<br>*Er telduskipanin hjá Umhvørvisstovuni royndarkoyrd og klár at brúka?* |

| | |
|---|---|
| § 3. 1) Tá jarðhitaskipanin er klár at taka í nýtslu, skal brunnborarin senda viðkomandi kommunu oyðiblaðið sbrt. § 2, stk. 2, við teimum upplýsingum, sum eru nevndir í nr. 1-6, og sum brunnborarin hevur skrivað. Upplýsingarnar eru:<br><br>1) longd av stálrøri frá yvirflatu og niður á hellu,<br><br>2) samlað longd av boriholi og longd av aktivum boriholi,<br><br>3) grundvatnsstandur máldur í metrum undir yvirflatu,<br><br>4) longd av hitasavningarslangu,<br><br>5) lýsing av jarðslagi á ymsum dýpdum, og<br><br>6) vatnmongdum í litrum pr. tíma á ymsum dýpdum.<br><br>Stk. 2. Í jarðhitaskipanum við fleiri boriholum skulu upplýsingar sbrt. stk. 1 latast fyri hvørt borihol sær, og hartil skal samlaða longdin av innsamlingarslangum viðmerkjast. | **§ 3.** Tá boriholið til jarðhitaskipan er borað, skal brunnborarin skráseta upplýsingarnar nevndar í nr. 1-3, í telduskipanina. Upplýsingarnar eru:<br><br>1) longd av stálrøri frá yvirflatu og niður á hellu,<br>• **Viðmerking:**<br>Ynskiligt er at at full fóðurlongd verður upplýst, og hvar hellan er, tí at tað kann verða neyðugt at fóra longur niður um enn einans 2 metrar.<br><br>2) samlað longd av boriholi,<br><br>3) vatnmongdum í litrum pr. tíma á ymsum dýpdum. |
| **§ 9.** Krøv til boring av holi til lodrætta jarðhitaskipan eru, at:<br><br>1) kompressari, borivognur og aðrar maskinur, sum verða brúktar til boriarbeiðið, skulu vera CE merktar,<br><br>2) súgvandi tilfar skal altíð vera tøkt á arbeiðsplássinum,<br><br>3) plássið, har boriholið er, skal merkjast við einum frámerki á húsagrundini ella á øðrum sjónligum staði, og<br><br>4) tilfar frá boringini skal burturbeinast á ein tryggan hátt, soleiðis at hetta ikki kemur út í nærumhvørvið, t.e. áir, løkir, kloakkir ella út í lendið. | **§ 9.** Krøv til boring av holi til lodrætta jarðhitaskipan eru, at:<br><br>1) kompressari, borivognur og aðrar maskinur, sum verða brúktar til boriarbeiðið, skulu vera CE merktar,<br><br>2) súgvandi tilfar skal altíð vera tøkt á arbeiðsplássinum,<br><br>3) plássið, har boriholið er, skal merkjast við einum frámerki á húsagrundini ella á øðrum sjónligum staði, og<br><br>4) tilfar frá boringini skal burturbeinast á ein tryggan hátt, soleiðis at hetta ikki kemur út í nærumhvørvið, t.e. áir, løkir, kloakkir ella út í lendið.<br><br>5) brunnborari skrásetir boridato í telduskipanini nevnd í § 7, stk. 1 í lógini í minsta lagi 14 dagar áðrenn farið verður undir at bora.<br><br>6) alt borivatn skal ígjøgnum eina botnfellingarskipan, soleiðis at boristøv og annað ikki kemur út í nærumhvørvið, |

| | |
|---|---|
| | 7) Markvirðið fyri mongd av boristøvi í borivatni skal í mesta lagi vera 1.000 mg/l<br>• **Viðmerking:**<br>*Hvat tekur 1000 mg/L støði í? Kanningar hava verið gjørdar av hesum, har tað hevur víst, at tað ikki er gjørligt at halda seg til kravið. Hetta er millum orsaka av tí tilfarinum, sum er í undirgrundini.*<br><br>8) bingjan skal standa í minsta lagi 24 tímar uttan røring, áðrenn borivatnið verður latið út. Er borivatnið sjónliga skitið, hevur brunnborari skyldu til at steðga við útleiðingini og víða til vatnið er reint.<br>• **Viðmerking**:<br>Hvørji pláss eru góðkend til at móttaka boritilfar, ið er botnfelt í minsta lagi 24 tímar? Runavíkar kommuna hevur ikki tilskilað borifeløgum eitt stað til at sleppa av við boritilfar aftaná boring. Skal eitt móttakastað hava eina góðkenning?<br>Er tað prógva, at 24 tímar kunnu vera nokk til botnfelling av boristøvinum í bingjuni?<br><br>9) stálfóðurrør, sum í minsta lagi eru 6 metrar long, skulu stoypast í minsta lagi 2 metrar niðurum fasta hellu og eftir fyriskrivaðari mannagongd hjá Umhvørvisstovuni.<br>• **Viðmerking:**<br>Í dag eru stálfóðurrørini 3 metrar long, men nokkso vanligt er at fóðra 6 metrar niður í jarðhitaholið.<br>Skal 9) skiljast soleiðis at boriholið skal fóðrast minimum 6 metrar niður, og har av skulu 2 metrar verða niðurum fasta hellu? Um so er, so verður viðmælt at broytinga orðingina í 9).<br>Í dag verður fóðrað ymisk alt eftir hvussu tilfarið er. Er talan um lutfalsliga leyst tilfar, so verður fóra meira enn 6 metrar. Verður borað á góðari hellu, verður tað fóðrað 3 metrar niður, har av 2 metrar eru tá longu niður um fasta hellu. |

| | |
|---|---|
| | 10) reinsiskipanir, har evnafrøðilig evni ella filtur verður brúkt til botnfelling, skulu góðkennast av Umhvørvisstovuni, áðrenn tær verða brúktar<br><br>11) brunnborari skal boða kommununi frá beinanvegin varðhugi er um, at artesiskt vatn er størri enn 1.000 l/t.<br>• **Viðmerking:**<br>Viðmælt verður at leggja afturat, "til støðutakan hjá kommununi" Hetta fyri at at kommunan skal meta um neyðug tiltøk skulu setast í verk evt. við ráðgeving frá Jarðfeingi.<br>Kommunan skal tá taka støðu til um tiltøk eru neyðug at seta í verk. |
| *Gjøld*<br><br>**§ 11.** [1)] Kommunan kann áseta gjøld fyri veitan av loyvi sbrt. § 1, stk. 3. Umhvørvisstovan kann áseta gjøld fyri góðkenning av brunnborara sbrt. § 5, stk. 5 og fyri góðkenning av hitapumpuinstallatøri sbrt. § 6, stk. 4. Gjøldini mugu ikki vera hægri enn umsitingarkostnaðurin av tænastuni. | *Gjøld*<br><br>**§ 11.** [1)] Kommunan kann áseta gjøld fyri veitan av loyvi sbrt. § 1, stk. 3. Umhvørvisstovan kann áseta gjøld fyri góðkenning av brunnborara sbrt. § 5, stk. 5 og fyri góðkenning av hitapumpuinstallatøri sbrt. § 6, stk. 4. Gjøldini mugu ikki vera hægri enn umsitingarkostnaðurin av tænastuni.<br><br>*Stk. 2.* Fyri ummæli eftir § 5, stk. 1 í lógini og fyri mátingar, skrásetingar og ráðgeving sbrt. § 7 a í lógini, tekur Jarðfeingi eitt gjald á kr. 2.000 fyri hvørt jarðhitahol.<br>• **Viðmerking**:<br>Tað verður mett sera óheppi fyri borgaran um gjaldi til Jarðfeingi kann dýrka um kostnaðin av Jarðhitaskipan. Tó er neyðugt, at Jarðfeingi fær neyðuga fígging til arbeiðið, sum skal gera í sambandi við jarðhitahol. Kundi fíggingin verið funnin aðrastaðni enn tí sum bíleggur sæe jarðhitaskipan?<br><br>*Stk. 3.* Installatørurin skal gjalda gjaldið í stk. 2 til Jarðfeingi í seinasta lagi, tá umsókn um loyvi til jarðhitaskipan verður latin kommununi.<br>Stk. 4. Er gjaldið í stk. 2 ikki goldið til ásettu tíð, steðgar viðgerðin av umsóknini til installatørurin hevur goldið gjaldið |